# Eitt talirør hjá brúkaranum

**Mikukvøldið varð Brúkarasamtakið sett á stovn. Samtakið skal kunna brúkaran um síni rættindi, og skal annars vera eitt talirør hjá føroyska brúkaranum mótvegis myndugleikunum**



Millum 30 og 40 fólk høvdu mikukvøldið leitað sær á stovnandi fund hjá Brúkarasamtakinum. Nú nevndin hevur skipað seg, er klárt at fara til verka



BRÚKARASAMTAK
*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Føroyar teljast millum mest tilafturskomnu lond, tá tað snýr seg um at verja brúkaran og tryggja honum síni rættindi. Tí havi eg alla orsøk til at halda, at samtakinum fer at vera lív lagað. Tað sigur Gunnleivur Dalsgaard, sum mikukvøldið var við til at stovna Brúkarasamtakið.

Endamálið við Brúkarasamtakinum er fyrst og fremst at vera eitt talirør hjá brúkaranum mótvegis myndugleikunum. Uppgávan hjá samtakinum er fyrst og fremst at kunna brúkaran um síni rættindi, og eisini samskifta við myndugleikarnar í brúkaramálum.

Gunnleivur Dalsgaard sigur, at tað skal bera til hjá fólki at venda sær til Brúkarasamtakið við málum og vísa á skeivleikar av ymsum slag í brúkaramálum. Ætlanin við samtakinum er tó ikki at seta fólk í starv, sum skal viðgera øll einkultmál, men heldur verður uppgávan hjá felagnum at upplýsa um málini, so brúkarin gerst varugur við síni rættindi.

### Vón um góðan byr

Tankin um brúkarafelagsskapir er ikki nýggjur, áður hava brúkarafeløg verið í Føroyum, men eru síðan dottin niðurfyri aftur. Gunnleivur Dalsgaard hevur tó vónir um, at Brúkarasamtakið er komið fyri at vera. Hann leggur dent á, at endamálið er at fáa so nógv fólk sum gjørligt við í samtakið. Øll kunnu gerast limir í Brúkarasamtakinum, bæði einstaklingar og feløg. Limagjaldið er 100 krónur um árið.

### Nevndin skipað

Á stovnandi fundinum mikukvøldið varð Ingun Simonsen vald til formann, meðan hini í nevndini eru Hans Pauli Strøm, Gunnleivur Dalsgaard, Høgni Debes Joensen og Kristina Samuelsen. Eykalimir eru Edvin Joensen og Kate Sanderson. Nevndin í Brúkarasamtakinum skal veljast á hvørjum ári.

Í fyrstu atløgu fer Brúkarasamtakið at hava adressu í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, men í næstum fer samtakið at gerast meira sjónligt við egnum telefonnummari og teldupostadressu. Nú verður somuleiðis farið undir at skipa arbeiðið hjá Brúkarasamtakinum.

# Marknaðardagur á Argjum

**Leygardagin verður stórur marknaðardagur í Argja skúla. Umframt hópin av tiltøkum til børnini verður millum annað stórur fiskamarknaður á skránni. Tað er felagið Føroya Barna Missión, sum skipar fyri, og inntøkan fer til hjálparарbeiði uttanlanda og til eina barna- og ungdómsmiðstøð í Havn**




*Vagn í Geil hevur saman við konuni Anju tikið stið til felagsskapin Føroya Barna Missión. Leygardagin er fyrsta tiltak á skránni, ein stórur marknaðardagur, sum verður hildin í Argja skúla*

TILTAK
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Felagið Føroya Barna Missión fer nú undir sítt fyrsta, stóra tiltak. FBM, sum hjúnini Anja og Vagn í Geil hava sett á stovn, hevur í hyggju at savna pengar til at seta á stovn eina barna og ungdómsmiðstøð, ið serliga er ætlað børnum og ungum við ymsum trupulleikum. Tey meta avgjørt, at tørvur er á einum tílíkum húsi í høvuðsstaðnum.

Felagsskapurin Føroya Barna Missión er nýggjur, men hevur samband við norska felagsskapin Carismissjonen.

Leygardagin verður so farið undir fyrsta stóra tiltakið, ein marknaðardag, sum verður hildin í Argja skúla. Á skránni er millum annað kokutombula, andlitsmáling, hoppiborg, hárviðgerð, ríðing á hesti og eisini verður ein rusjibani settur upp. Harumframt verður søla av kjøti og eisini ein stórur fiskamarknaður, har til ber at keypa bæði frystan fisk í kiloposum, gullaksafars og eisini ræstan fisk.

– Tað er at fegnast um, hvussu stóra vælvild vit hava møtt frá fólki til hetta tiltakið. Eitt nú hava vit fingið fisk og gullaksafars frá flakavirkjum, og eisini hava vit fingið ræstan fisk frá ymsum skipum. Alt hava vit fingið ókeypis, sigur Vagn í Geil.

Fyrireikarnir ætla, at marknaðardagurin í Argja skúla leygardagin skal halda fram allan dagin. Umframt tiltøkini og kjøt- og fiskamarknaðin, so ber eisini til at vinna ein skutara og fýra oksafjórðingar. Eisini ætla tey at selja pylsur og sunkist. Til at hjálpa sær leygardagin hava fyrireikarnir fingið ein skúlaflokk á Argjum.

Vagn í Geil sigur, at skal málið við at fáa ein barna- og ungdómshús sett á stovn í Havn, so skulu nógvir pengar til. Tí er tiltakið á Argjum leygardagin bara tað fyrsta í røðini av fleiri.

Marknaðardagurin á Argjum leygardagin byrjar klokkan 10 og heldur fram til klokkan 19.



# Agip borar í juni

**Í næsta mánað fer Agip undir at gera seinastu kanningar á havbotninum, har felagið skal til at bora í juni næsta ár. Tá kemur eisini nýggi oddamaðurin fyri Føroyaprojektinum, Luca Dragonetti til Føroya úr vesturafrika, hagani hann sum førning hevur við sær drúgvar royndir við at bora á djúpum vatni. Føroya Kolvetni fyrireikar seg eisini til spennandi boringina**



*Jack Bates er ein av boripallunum, sum kann koma uppá tal at bora 4. brunnin á landgrunninum. Hann er kendur frá fleiri boringum hinumegin markið og er mettur sum ein av teimum mest framkomnu í heiminum*

LEITING
*Jan Müller*

Um gott og væl eitt hálvt ár ella neyvari, í juni næsta ár er ætlanin at seta borin í aftur føroysku undirgrundina. Italski oljurisin Agip stendur fyri tørni, nú øll hini oljusamtøkini, Statoil, BP og Amerada hava gjørt eina fyrstu roynd. Stóri spurningur í løtuni er, hvør boripallur fer at verða brúktur til hesa 4. boringina á landgrunninum. Agip er í løtuni við at leggja seinastu hond á eina avtalu um leigu á boripalli, men enn er ikki avgjørt, hvør boripallur talan er um. Tó eru ikki so nógvir at velja í, tí bert nakrir heilt fáir kunnu bora á djúpum vatni við Føroyar, kanska færri enn fimm. Sosialurin skilur, at tað møguliga verður ein gamal kenningur á Atlantsmótinum, tann sera framkomni Jack Bates, sum eigur nógvar boridagar hinumegin markið.

Aldo Napolitiano, stjóri hjá Agip í Aberdeen sigur við blaðið, at teir einaferð í næstu framtíð fara at gera avtalu um ein boripall men kann hann ikki í løtuni seg navn á. Hann upplýsir annars, at felagið í næsta mánað fer undir eina "side survey" kanning. Hetta er tað arbeiðið, sum øll oljufeløg binda seg til at gera, áðrenn endaliga borilokalitiónin verður ásett. Sjálv borioperatiónin fer annars at verða stýrd frá skrivstovuni í Havn. Herfyri varð Ron Lansdell, sum hevur staðið á odda fyri Føroyaprojektinum fluttur til Kasakstan. Miðjan november kemur so maðurin, ið skal taka yvir, til Føroyar. Tað er Luca Dragonetti, sum hevur drúgvar royndir frá boring á djúpum vatni út fyri vesturafrika. Tað verður so hann, sum skal standa fyri 4. boringini á Føroyaøkinum og møguliga blíva tann, sum fær bingo. Boringin næsta summar verður mett at taka einar tveir mánaðir, og tá verður so aftur virksemi hjá føroyskum fyritøkum, eitt nú á Útgerðarhavnini í Runavík, hjá føroyska partinum av Eurest, sum letur matvørur til boringina og hjá Atlantsflog, sum tekur sær av flutninginum av borifólki - treytað av at hesi eru kappingarfør, hvat tey hava verið undir hinum trimum boringunum.

Uppá fyrispurning um úrslitið av seinastu boringini hjá Hess í bretskum øki fær nakra ávirkan á boringina hjá Agip sigur Aldo Napolitiano, at tað ger hon ikki. Hon hevur sum so einki við Agipboringina at gera, sum liggur væl longur norðuri. Hann heldur tað eisini vera alt ov tíðliga at siga nakað um, antin tann boringin er vorðin miseydnað ella ikki. Hann sigur annars, at teir framvegis hava samráðingar við onnur oljufeløg um at koma uppí loyvið. Umframt boringina hjá Agip á landgrunninum fer eisini ChevronTexaco at bora ein brunn beint hinumegin markið næsta summar. Við øðrum orðum kunnu úrslitini av hesum báðum brunnum fáa stóran týdning fyri víðari tilgongdina á Føroyaøkinum og Atlantsmótinum sum heild.

Hjá Føroya Kolvetni, sum eru við í Agipboringini, verður eisini arbeitt miðvíst at gera seg til reiðar til hesa stóru uppgávuna. Felagið hevur 7% lut í loyvinum men kann økja tað til 22%. Niels Sørensen sigur, at tað er framvegis ætlanin og verður nú hugt at, nær felagið skal fara á gjaldoyrabørsin eftir tí neyðuga kapitalinum. Við 7% koma teir at gjalda knappar 20 mill. kr. meðan upphæddin fyri at luttaka við 22% verður nærri teimum 50 mill. kr. Hetta er so ikki meira enn fyri ein lítlan trolara leggur Niels Sørensen aftrat.




*West Navion, sum er kent um okkara leiðir, fer neyvan at bora fleiri brunnar á Føroyaøkinum næstu trý árini. Statoil og Smedvig eru við at leggja seinastu hond á eina avtalu við indiskt oljufelag um eitt 2-3 ára langt boriprogramm*

Oljuleiting á vegamóti:

# Meðan bíðað verður eftir oljuni





*Risastóra Snøvitprojektið verður eisini ein partur av oljuráðstevnuni í ár. Á myndunum siggja vit Hammerfest og gassterminalin á Melkøya, soleiðis sum hann fer at síggja út tá henda verkætlan fyri 40 mia. kr. er liðugt.*

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Aftur í ár verður skipað fyri oljuráðstevnu í Føroyum. OFFSHORE FAROES 2002 verður í ár 4. december í Norðurlandahúsinum. Hóast tað gongur spakuliga við leitingini á landgrunninum og hóast úrslitini hava verið í lakara lagi, so hava hvørki oljufeløg ella myndugleikar mist trúnna uppá at gera lønandi oljufund á økinum. Kortini er avgjørt ikki at gera eins nógv burtur úr oljuráðstevnuni hesaferð sum seinast. Hon varir bara í ein dag.

Á skránni verður millum annað:

- Status frá Oljumálaráðnum og oljufyristøðufeløgunum í Føroyum
- Møguleikar at finna olju á føroyskum øki í framtíðini og næsta loyvisrunda
- Royndir í Norður Norra, millum annað royndir at fáa størri part av oljuvinnuni norðureftir
- Hvat eru pengar til førleikamenning millum annað brúktir til
- Og annað

Fyri aðru ferð er tað Oljuvinnufelagið, sum stendur fyri oljuráðstevnuni.

Oljumálaráðið og FOIB (oljufyristøðu-feløgini í Føroyum) hava tó stóran leiklut í at seta skránna saman.

Øll hava møguleika at vera við til ráðstevnuna, sum tó ikki er ókeypis. Tað ber til at fáa tilmeldingarblað frá Vinnuhúsinum og tað ber til at melda seg til Offshore Faroes 2002 beinleiðis umvegis heimasíðuna www.industry.fo. SÍÐSTA FREIST at melda seg er 20. NOVEMBER.

Prísurin fyri at luttaka er 1000 krónur. Fyri limir í Oljuvinnufelagnum er prísurin 750 krónur. Verður meldað til seinni enn 20. november er prísurin hægri.

Í sambandi við oljuráðstevnuna gevur Tíðindablaðið Sosialurin út eitt serblað um oljuvinnu. Blaðið kemur út sama dag, 4. desember sum partur av vanliga blaðnum.